# Flakavirkið í Sørvági letur uppaftur

**Nýtt felag er stovnað, sum fer at reka flakavirkið í Sørvági. Byrjað verður við saltfiskaarbeiði, men ætlandi verður annað seinni**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*



*Eftir at gólvið hevur verið turt síðan einaferð í vár, verður nú væntandi arbeiði aftur á flakavirkinum í Sørvági fyrsta dagin*

Væntandi verður aftur lív í flakavirkinum í Sørvági ein av fyrstu døgunum. Nýtt felag er stovnað, sum hevur leigað virkið og maskinurnar frá Vesturvón.

Tað er felagið Vestís Seafood, sum fer at reka flakavirkið í Sørvági, nú tað verður latið uppaftur. Hetta er felag, sum leiðslan á Norðís á Eiði saman við Vesturvón í Sørvági eigur.

Jóhan Páll Joensen, sum er annar høvuðspartaeigarin í Norðís, sigur, at tað er felagið Maru Seafood, sum eigur tveir triðingar av partapeninginum í Vestís Seafood, meðan Vesturvón eigur tann triðja.

Maru Seafood er eisini felagið aftan fyri flakavirkið Norðís á Eiði. Jóhan Páll Joensen eigur Maru Seafood saman við skyldmanninum Jóhan Davidi Joensen. Teir eiga eisini saltfiskavirkið Sammut í Klaksvík.

Virkið í Sørvági er í rímiliga góðum standi, og tí er lítið at gera við tað, sigur Jóhan Páll Joensen. Tað var opið til fyri umleið hálvum ári síðan, og hann væntar at fáa góðkenning ein av komandi døgunum, so farast kann í gongd sum skjótast.

Jóhan Páll Joensen sigur, at ætlandi verður farið at arbeiða saltfisk á Vestís Seafood, nú byrjað verður. Men seinni verður, um tað gongst eftir ætlan, eisini farið at arbeiða fesk fløk eins og heilan fisk. Hann nevnir í hesum førinum eitt nú svartkalva, sum kann koma upp á tal.

Tað verður ikki sligið so øgiliga stórt upp beinanveg, sigur Jóhan Páll. Kanska fáa tey eini 800-1.000 tons ella so árliga. Og tað vil so aftur siga, at tað verður heldur ikki so øgiliga nógv fólk til arbeiðis, nú byrjað verður aftur. Til saltfiskaarbeiðið væntar hann arbeiði til eini 12 fólk ella har á leið.

Vestís Seafood fer á marknaðin at kappast um at fáa fisk. Og selt verður eisini á fría marknaðinum. Jóhan Páll Joensen sigur, at teir fara at selja saman við Norðís og Sammut. Tað liggur í, at har verður samstarv allan vegin heldur enn kapping, sigur hann.

Men hann væntar harða kapping yvirhøvur á marknaðinum. Eftirspurningurin á heimsmarknaðinum er stórur, so líkt er til, heldur Jóhan Páll Joensen, at prísirnir fara at halda sær enn eina tíð.

Hann sigur, at avtalan við Vesturvón er slík, at hon gevur góðar vónir til, at tað skal fara at bera til at reka eitt flakavirki í Sørvági.

# Útbygging á Gomlu Rætt kann loyvast

**Prinsipielt kann Vinnumálastýrið taka undir við at loyva vinnuligari útbygging á Gomlu Rætt, um tað kann gerast innan fyri verandi fíggjarkarm hjá Landsverkfrøðinginum**

ÚTBYGGING
*Edvard Joensen*



*Vinnumálastýrið metir ikki, at nakað forðar fyri vinnuligari útbygging á Gomlu Rætt. Men pengar eru eingir til slíka útbygging sum er*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Vinnumálastýrið metir ikki, at nakað forðar fyri vinnuligari útbygging við ferjuleguna á Gomlu Rætt, verður sagt í brævi til Landsverkfrøðingin í samband við umsóknina frá Hólmalaksi um útbygging á Gomlu Rætt.

Í blaðnum í gjár varð sagt frá, at Hólmalaks í meira enn eitt ár hevur bíðað eftir svari upp á umsókn um útbygging á økinum við ferjuleguna á Gomlu Rætt.

Hóast umsókn er send myndugleikunum í mai mánaða í fjør, er enn einki endaligt svar komið, segði Jens Reinert, stjóri á Hólmalaksi við Sosialin í gjár.

Brævaskifti hevur verið millum Hólmalaks, Landsverkfrøðingin og Vinnumálastýrið um, hvørt tað ber til at byggja út til vinnuligt endamál við eina almenna samferðsluhavn.

Landsverkfrøðingurin vildi hava at vita frá Vinnumálastýrinum, um tað er politiskur vilji til at reka vinnuligt virksemi við eina almenna ferjuhavn.

Tað hevur Vinnumálastýrið svarað Landsverkfrøðinginum aftur upp á í skrivi dagfest tann 29. mai í ár, har millum annað verður sagt soleiðis:

»Vinnumálastýrið skal boða frá, at tað prinsipielt kann taka undir við at loyva vinnuligum virksemi á havnarlagnum, um tað møguliga eyka arbeiði, ið stendst av hesum, kann gerast innan fyri verandi fíggjarkarm hjá stovninum, og um Strandfaraskip Landsins kann taka undir við ætlanini. Havnin á Gomlu Rætt er fyrst og fremst ætlað sum samferðsluhavn, men um vinnuligt virksemi á havnarlagnum ikki nervar samferðsluviðurskiftini, sær Vinnumálastýrið onga orsøk til at nokta hesum.«

Viðari verður sagt í skrivinum, at mett verður kortini ikki, at íløgan í atløgusíðu verður raðfest á verandi íløguætlan, eins og tað eisini er lítið sannlíkt, at bátabrúgvar í havnini verða raðfestar ovarlaga.

Tað var Kirkjubøar Kommuna, sum hevði fyrispurning um at fáa bátapláss í havnini á Gomlu Rætt.

Sum skilst á skrivinum frá Vinnumálastýrinum, skal Strandferðslan eisini inn í málið, áðrenn tað er endalig avgreitt. Vinnumálastýrið vil tryggja sær, at ein møgulig útbygging ikki fer at tarna Teistanum.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfaraskipum Landsins, sigur við Sosialin, at hann kennir als einki til hatta málið yvirhøvur. Hann hevur ikki sæð tað á stovninum, og hevur tí, sum vera man, onga viðmerking til tað.

Hóast Vinnumálastýrið hevur svarað Landsverkfrøðinginum tann 29. mai, hevur Hólmalaks einki frætt aftur um umsóknina, sum í fyrsta umfari varð send Kirkjubøar Kommunu tann 19. mai í fjør.

Tað metir felagið ikki vera nøktandi og rykkir tískil Landsverkfrøðingin eftir svari í brævi, sum sent er tann 16. august í ár, har millum annað verður víst á, at felagið Hólmalaks hevur fingið fígging til verkætlanina á Gomlu Rætt longu í juni 1999.



*Oljufelagið Statoil hevur havt ein oljuleka, og ein partur av umfatandi oljudálkingini á Havnarvág stavar óivað haðani*



# Statoil havt oljuleka

**Mikudagin 22. august staðfesti Statoil ein oljuleka í einum av rørunum á bryggjuni í Havn. Umfatandi oljudálking hevur verið á Havnarvág seinastu tíðina, og ein partur av dálkingini stavar frá hesum lekanum**

DÁLKING
*Stefan í Skorini*

Býráðslimir í Tórshavn hava seinastu tíðina gramt seg í fjølmiðlunum um, at oljudálking hevur verið á Havnarvág. Ein partur av hesari dálking stavar frá einum oljuleka hjá Statoil.

Niels Juel Nattestad, stjóri á Statoil, váttar fyri Sosialinum, at felagið hevur havt ein leka á einum røri. Hann sigur, at hesin lekin var staðfestur mikudagin 22. august, og stig vórðu tikin til at steðga lekanum.

– Rørið var beinanvegin tømt, og vit sendu ein froskmann niður at kanna lekan. Harumframt legði sløkkiliðið eina oljusperru út, so oljan ikki skuldi breiða seg meira, sigur stjórin á Statoil.

Rørið, sum talan er um, er eitt importrør, sum verður nýtt at taka olju inn við. Nýtt rør verður lagt ein av komandi døgunum.

### Vita ikki hvussu leingi

Stjórin dugir ikki at siga, hvussu leingi olja er likin á sjógv, men hann sigur, at talan er um ein lítlan leka.

Lekin var einar tjúgu metrar frá sjónum, og tá rørið er undir jørð, sæst lekin ikki beinanvegin. Nú er rørið grivið upp, og lekin skal tettast.

– Tað er altíð ein fyrimunur at hava rørini omaná, men í hesum førinum ber tað ikki til, tí rørini kunnu ikki liggja á bryggjuni, sigur Niels Juel Nattestad.

Tað vóru menn, sum løgdu merki til, at olja bráaði við bryggjukantin, og tað var soleiðis, at funnið varð fram til oljulekan.

### Í størsta álvara

Stór oljudálking hevur verið á Havnarvág seinastu tíðina, og tí taka býráðslimir trupulleikan í størsta álvara. Schumann Hjaltalin sigur í samrøðu við blaðið í dag, at hann hevur skotið upp at seta á stovn eina umhvørvisdeild undir býráðnum, sum skal taka sær av slíkum dálkingum.

# Innbrot í læknahølum

INNBROT
*Stefan í Skorini*

Sunnunáttina var innbrot í læknahølunum hjá Andori Ellefsen og Kaj Kallsberg í Jónas Broncksgøtu.

Líkt er til at gerningsmaðurin hevur leitað eftir rúsandi evnum, men enn ber ikki til at staðfesta, um maðurin hevur fingið nakað stórvegis við sær. Innbrótarin hevur tó leitað væl og virðiliga í hølunum hjá Andori Ellefsen, verður sagt av kriminaldeildini.

Gerningsmaðurin er sloppin inn ígjøgnum høvuðsinngongdina, sum hann hevur brotið upp, og síðani hevur hann brotið seg ígjøgnum næstu hurðina.

Løgreglan sigur, at tað er ikki líkt til, at maðurin hevur fingið nakað serligt burturúr innbrotinum.

Innbrot í Vági:

# Løgreglan hevur spor

INNBROT
*Stefan í Skorini*

Sunnunáttina vóru tvey innbrot framd í Vági hvørt eftir annað. Løgreglan heldur, at tað eru somu gerningsmenn, sum talan er um.

Eitt innbrot var í Shellstøðini á Bakka, har menn fóru avstað við 1.000 krónum. Hitt innbrotið var í krambúðini á Gørðunum. Har brutu teir seg inn gjøgnum hurðina í kjallaranum, og sluppu sær síðani uppá.

Gerningsmenninir hava leitað eftir peningi á skrivstovuni, men hava ikki funnið stórvegis at taka við sær, tí enn ber ikki til at staðfesta, um nakað er tikið. Eingin hevur verið í sjálvum handlinum.

Løgreglan í Suðuroy sigur, at hon hevur onkrar ábendingar at ganga eftir uttan at siga, hvat hesar innibera. Hon dugir hinvegin ikki at siga, um talan er um fleiri innbrotstjóvar ella ein einstakan.

# Heimaforbundið byrjar aftur

Heimaforbundið hjá Frelsunarherinum byrjar nú aftur eftir summarsteðgin. Byrjað verður aftur í Tórshavn hósdagin 6. september klokkan 20.00.

Tá bjóðar Frelsunarherurin øllum til eina hugnaløtu saman við nýggju leiðarunum fyri Vág og Tórshavn. Teir eru Majorarnir Elisabeth og Sámal Jákup Joensen, og tey fara at syngja og at hava andakt.

Slagorðið hjá Heimaforbundinum er »Kristus inn í hvørt heim«.

Heimaforbundið er ein kvinnufelagsskapur hjá Frelsunarherinum. Forbundið fór undir virki sítt í Føroyum í 1930, og tað virkar í dag í Vági og í Tórshavn.

# Leitingin á sjógvi er steðgað

LEITING
*Stefan í Skorini*

Bjargingarliðini eru givin við at leita á sjónum eftir 70 ára gamla Óla Dam. Leitað hevur verið í fleiri dagar á sjónum, men uttan úrslit.

Brimil og Tjaldrið hava leitað um allan fjørðin saman við Vaktar- og Bjargingartænastuni og bjargingarfeløgum uttan at finna mannin. Løgreglan hevur leitað við hundum á landi.

Hóast leitingin á sjónum er steðgað, so fara fólk regluliga at ganga framvið sjóvarmálanum fyri at vita, um maðurin er skolaður uppaftur.